– Eg helt, at hetta ljóðaði áhugavert og fór at tosa við Jason Johannesen, sum tá var virkisleiðari á virkinum í Saltangará um møguleikarnar fyri læruplássi.

Hon sigur, at Jason í fyrsta umfari ivaðist í, um hon veruliga meinti tað, tá ið hon ætlaði sær í skúla.

– Men so ein dagin spurdi hann meg, um eg meinti tað – og tað gjørdi eg, hóast eg ikki hevði verið á skúlabeinki í næstan 20 ár.

Maud sigur, at við tað, at hon bert hevði eitt gamalt 10. floksprógv, fór hon fyrst á Fiskivinnuskúlan í eitt ár, har hon bara gekk í skúla.

– Soleiðis gekk eg í skúla alt tað fyrsta árið, annað árið var eg bara í praktikk, og nú triðja árið havi eg gingið tveir dagar í skúla – og arbeitt á virkinum hinar tríggjar dagarnar í vikuni.

Lærutíðin hjá Maud er úti, 1. juli, men enn veit hon ikki rættiliga, hvat hon fer at gera.

– Eg vænti, at eftirspurningurin eftir mær verður stórur, nú eg eri liðug – og hava tað so ómetaliga gott við tað, sigur hon skemtandi.

Maud dylir ikki, at hon hugsar um okkurt annað enn bara at fara aftur á eitt flakavirkisgólv, sum henni annars hevur dámað ógvuliga væl.

– Eg kundi eitt nú hugsað mær at arbeitt sum góðskuleiðari ella okkurt tílíkt, men tað fer tíðin at vísa, leggur hon aftrat.



*Her stendur Maud undir liðini á Juliusi Steingrund, sum er elsti maður á virkinum hjá Fiskavirking í Saltangará, har hann hevur starvast síðan 1973*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Útbúgvin alari

Hon veit annars at fortelja, at eingin nýggjur næmingur byrjar á Fiskivinnuskúlanum sum fiskavirkari í summar, men hon heldur, at ein byrjar sum alari.

– Tað eru onnur enn eg, sum í løtuni taka hesa útbúgving, og gongst sum ætlað, verður onkur liðugur komandi ár. Men eg eri so tann fyrsti fiskavirkarin við útbúgving eftir hesi skipan í Føroyum, og tað kenni eg sum nakað serstakt.

Maud veit eisini at siga, at ein annar fuglfirðingur, Eliseus Johannesen, sum er 28 ára gamal og hevur verið í læru hjá Laksá, í summar verður fyrsti útbúni alarin í Føroyum eftir hesi somu skipan um yrkisútbúgving.

– Í lærutíðini havi eg starvast allastaðni á virkinum – heilt av gólvinum og upp til leiðsluna, sigur Maud Túgvustein, sum var í góðum hýri, tá ið Sosialurin hitti hana hóskvøldið og fríggjamorgunin á virkinum í Saltangará.

At enda heldur hon, at tað er umráðandi fyri fólk, sum ynskja sær eina slíka útbúgving, at hesi hava arbeitt við fiski áður.

– Jú, tað haldi eg so avgjørt er ein fyrimunur, sigur fryntligi – og fyrsti – føroyski fiskavirkarin.

# Lærararnir hava einki við stríðið at gera

**Starvsnevndin í Lærararáðnum á Føroya Handilsskúla í Havn ger nú greitt, at hon er ikki partur av málinum millum leiðsluna og lærararnar hjá datamatikarunum, sum søgdu seg úr starvi**

SKÚLASTRÍÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hevur nakað av ófriði verið rundan um útbúgvingin hjá datamatikarnunum á Føroya Handilsskúla í Havn. Báðir lærararnir, sum undirvístu datamatikaranæmingunum, søgdu seg úr starvi, tí teir hildu seg ikki kunna arbeiða undir umstøðunum á skúlanum.

Tað setti næmingarnar og leiðsluna í eina trupla støðu, tí næmingarnir fara júst nú undir seinasta partin av lesnaðinum, og tað skulu teir eftir øllum at døma gera við nýggjum lærarum.

Nú ger starvsnevndin í Lærararáðnum á Føroya Handilsskúla í Havn greitt, at hon er ikki partur av stríðnum, sum hevur verið og er millum lærararnar hjá datamatikarunum og leiðsluni í skúlanum.

Eitt stutt fráboðan er send Sosialinum um hetta, men starvsnevndin vil ikki gera fleiri viðmerking. Sagt verður bara, at endamálið við fráboðanini er, at Lærararáðið og teir vanligu lærararnir einki hava við málið at gera, og at tað ongantíð er viðgjørt á nakran hátt í Lærararáðnum.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

## Bootles sigur søguna um Beatles í Klaksvík

Síðsta vikuskiftið í juni kemur ein poppbólkur úr Liverpool til Klaksvíkar at spæla. Bólkur kallast The Bootles, og teir spæla tónleik hjá The Beatles. Tað ger bólkurin so væl, at hann hevur verið umtalaður víða hvar fyri sínar framførslur.

The Observer skrivaði einaferð um The Bootles, at teir ljóða næstan meira sum The Beatles, enn beatlarnir sjálvir gera. Fríggjakvøldið 24. juni spælir bólkurin í Klaksvík

The Bootles hava í nógvum londum í Europa, og teir plagdu eisini at spæla nógv á The Cavern, har The Beatles eisini spældi. Og tað kom fyri, at báðir bólkarnir spældu til somu tiltøk.

The Bootles tók sítt navn í 1980, men áðrenn tað gingu teir undir navninum Jasmin-T, og hesin bólkurin spældi sangin Faroe Girl, sum var nógv spældur í Føroyum.

The Bootles fer á konsertini í Klaksvík at siga søguna um The Beatles, og tað verður sjálvsagt fyrst og fremst gjørt við tónleiki hjá helst størsta poppbólkinum í søguni. Konsertin við The Bootles verður í KÍ-høllini fríggjakvøldið 24. juni kl. 21.00.

**ek**

## Science Fiction við nýggjari fløgu

Ársins livebólkur í Føroyum í 1985 kemur í næstum við sínari næstu fløgu – 20 ár eftir at tann tann fyrsta fløgan hjá bólkinum kom út.

Science Fiction var ein sera virkin bólkur í 1980'unum, og teir gjørdust millum annað Ársins livebólkur í 1985. Sama ár fóru teir í RMS Studio í Runavík og spældu eitt band inn. Á hesum bandi finnast sangir sum Came From A Bar, Í Skúrið, Crazy Town og Like A Slave.

Seinastu mongu árini hevur Science Fiction ikki verið nógv frammi, men teir hava tó vant og verið í studio seinastu tvey árini. Úrslitið er á trappuni, og innanfyri nakrar fáar vikur kemur fløgan út.

Jákup Marner Anthoniussen er nú sum fyrr sangari í bólkinum úr Klaksvík.

**ek**